Álit

í

løgtingsmáli nr. 90/2022: Uppskot til løgtingslóg um ókeypis at avhenda ymiskt tilfar til P/F Suðuroyartunnilin

Aksel V. Johannesen, løgmaður, hevur lagt málið fram tann 28. mars 2023 og eftir 1. viðgerð tann 30. mars 2023 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 31. mars, 19., 21. og 26. apríl 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri P/F Suðuroyartunnilin, Landsverk, landsstýrismannin í fiski- og samferðslumálum, og løgmann, Aksel V. Johannesen.

Føroya landsstýri stovnaði P/F Suðuroyartunnilin tann 8. november 2022 við tí endamáli at gera undirsjóvartunnil ímillum Sandoynna og Suðuroynna við tilhoyrandi vegagerð og rakstri av hesum.

Vinnunevndin heldur, at framleiðsla av neyðugum undankanningum, og annars øll fyrireiking til hesa risa verkætlan, skal liggja hjá felagnum P/F Suðuroyartunnilin. Sostatt er nevndin samd við landsstýrið í, at tað tilfar, sum longu er framleitt, natúrliga eisini eigur at ligga hjá P/F Suðuroyartunlinum.
Seinastu 3 árini, 2020 til og við 2022 eru sambært almennum roknskapartølum brúktar 9,8 mió kr., sum Landsverk hevur umsitið.

Samlað yvirlit yvir útreiðslur sum brúktar eru:

Forkanningar o.a.	4.313.333 kr.
Ráðgeving	1.986.249 kr.
Leiga av skipum o.a.	1.688.740 kr.
Lønir/umsiting	1.464.104 kr.
Lýsing, prent o.a.	343.538 kr.
Annað	45.379 kr.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið

Vinnunevndin, 28. apríl 2023

Erhard Joensen formaður	Annika Olsen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Karlot Hergeirsson	Árni Skaale	Jørgen Niclasen

Eyðdis Hartmann Niclasen